# Kvinnur ímóti harðskapi hittust í Føroyum

*Hóast eingi neyv hagtøl eru í Føroyum, so verður mett, at harðskapur ímóti kvinnum og børnum er eins vanligur hjá okkum, sum í grannalondum okkara. Um vikuskiftið var ráðstevna á Hotel Føroyum, har 144 kvinnur úr øllum Norðurlondum hittust og m.a. komu við felags yvirlýsing, har mint verður á, at harðskapur er 6. største orsøk til skaðar á heilsustøðuna hjá kvinnum*

Dagfinn Olsen

Um vikuskiftið var á Hotel Føroyum ein ráðstevna, har 144 kvinnur úr øllum Norðurlondum hittust. Stevnan er einaferð árliga. Hetta var 7. stevnan undir heitinum Norðurlendskar kvunnur ímóti harðskapi. Stevnan ferðast millum londini og í ár er so Kreppumiðstøðin í Føroyum vertur.

**Steðgið monnunum**
Eitt av ítøkiligu úrslitunum av ráðstevnuni var ein yvirlýsing, har kvinnurnar gera greitt, at harðskapur mótvegis kvinnum og børnum er ein trupulleiki, ið menninir eiga og sum teir eisini hava ábyrgdina av. Spælt verður eitt sindur við orðunum, tá spurt verður, hví harðskapur ímóti kvinnum er kulturur, tá harðskapur ímóti monnum er torturur?

Víðari verður komið við tí rættiliga húgaverdu frágreiðing, at harðskapur ímóti kvinnum er 6. størsta orsøk til heilsubrek hjá kvinnum. Henda orsøk er frammaligari enn t.d. krabbamein, ferðsluskaðar og kríggj samanlagt.

Hetta er prógvað í kanning hjá WHO í 1993 og eisini hevur granskarin Karin Helweg-Larsen viðgjørt hetta í ætlanini Nor-Vold. Hon var millum fyrilestrahaldararnar á ráðstevnuni á Hotel Føroyum.

Í yvirlýsingini, ið gjørd var um vikuskiftið, spyrja kvinnurnar eisini, um heilsumyndugleikarnir framvegis hava í hyggju at nýta pening til lappaloysnir innan heilsuverkð, ella um ætlanin er at seta pening av til at steðga monnum, ið fremja harðskap ímóti kvinnum og børnum. Kravt verður, at myndugleikarnir í Norðurlondum taka sína ábyrgd av teimum monnum, ið fara harðliga fram mótvegis konum og børnum, so kvinnur kunnu liva í frælsi, sum sambært ST mannarættindasáttmálanum er mannarættur.

**Ráðharrin er vakin**
Føroyski heilsumálaráðharrin, Helena Dam á Neystabø, setti stevnuna. Hon kundi ikki koma við lyftum, men kom m.a. inn á børnini, sum gista á Kreppumiðstøðini og teirra umstøður.

Hon segði seg vera varugan við trupulleikarnar og segði seg halda vakið eyga við hesum trupulleikum.

Elin Reinert Planck frá Kreppumiðstøðini sigur, at júst børnini eru frammaliga í huganum á starvsfólkunum og ynski er um játtan til fleiri stavsfólk, júst fyri at veita børnunum dyggari hjálp.

**Børn á Kreppumiðstøð**
Tann 7. stevnan undir heitinum Norðurlendskar kvinnur ímóti harðskapi, byrjaði á Hotel Føroyum hósdagin og helt fram til sunnudagin. Umframt útferðir og løtur, har luttakarar kundu taka sær av løttum, vóru eisini fyrilestrar og workshops á skránni.

Randers Krisecenter og Nørre Sundby Krisecenter skipaðu fyri frágreiðing um børn á slíkum miðstøðum. Professarin Jóan Pauli Joensen helt fyrilestur um Det lille øsamfund. Malan Marnersdóttir røddi um kvinnuna í bókmentum og presturin Sonja Klein um kvinnur og religión.

Karin Helweg-Larsen greiddi frá um Nor-Vold ætlanina og luttakaralondini høvdu øll stutta framløgu viðvíkjandi harðskapsraktu kvinnuni og framtíðarvánum.

**Eingi føroysk tøl**
Elin Reinert Planck frá Kreppumiðstøðini sigur, at stevnan er fyri starvsfólk og sjálvboðin á kreppumiðstøðum og incestmiðstøðum.

Kvinnuhúsfelagið, ið stendur aftanfyri Kreppumiðstøðina, hevur 10 ár á baki.

Elin Reinert Planck sigur, at ein trupulleiki er, at eingi neyv tøl eru í Føroyum yvir kvinnur, ið eru fyri harðskapi.

Á Kreppumiðstøðini hava tey tøl yvir gistingar og yvir hvussu nógv venda sær til støðina at fáa hálp.

Men t.d. siga hagtølini hjá løgregluni ikki so nógv, tí eittnú húsaófriður hevur alt við. Har verður ikki greinað nærri. Tað kann vera kvinna, ið verður illa viðfarin av manninum, men tað kann eisini vera tveir mans, ið eru farnir til hendurs.

**Líka galið í Føroyum**
Men Elin Reinert Planck metir útfrá tølunum frá Kreppumiðstøðini, og útfrá sínum kunnleika annars, at vit í Føroyum liggja á sama støðið, sum grannalondini, tá tað ræður um harðskap ímóti kvinnum og børnum.



*Nøkur av føroysku umboðunum og vertunum á ráðstevnuni Kvinnur ímóti harðskapi. Jane Hoydal, Elin Reinert Planck og Winny í Pætursastovu*
*Myndir: Jan Müller*

» *Harðskapur ímóti kvinnum er 6. størsta orsøk til heilsubrek hjá kvinnum. Henda orsøk er frammaligari enn t.d. krabbamein, ferðsluskaðar og kríggj samanlagt* «



*Luttakarar komu úr øllum Norðurlandum at luttaka á stevnuni í Føroyum, sum var tann 7. í røðini*

## Norsk ráðharravitjan

*Í gjár komu Dagfinn Stenseth og Frú Raili Stenseth á vitjan í Føroyum, her tey m.a. hitta landsstýrismenn*

Dagfinn Olsen

Í gjár kom norski sendiharrin í Keypmannahavn á vitjan í Føroyum. Við á ferðini er konan Raili og sendistovuskrivarin Lars Petter Heine.

Í Føroyum skal Dagfinn Stenseth hitta Anfinn Kalsberg, løgmann, ríksumboð Vibeke Larsen, borgarstjóran í Havn, Leiv Hansen, landsstýrismann Høgna Hoydal, Kjartan Hoydal fyri norðurlendskt samstarv, oljumálaráðharran Eyðun Eltør, ferðavinnustjóra Hera Niclasen , Fiskimannafelagsformann Óla Jacobsen, bankastjóra Jørn Astrup Hansen. Eisini verður vitjað í Norðurlandahúsinum, Listaskálanum og útferð er á skránni.

Dagfinn Stenseth er føddur í 1936. Hann byrjaði í Uttanríkistænastuni 10. oktober 1960. Síðani hevur hann starvast í Moskva, Uttanríkisráðnum, Bonn, Ulan Bator, Tiblisi, Alma-Ata, Bisjkek, Tasjkent, Askhabad, Jerevan, Helsinki og nú Keypmannahavn. Hann hevur verið sendiharri, skrivstovustjóri, politiskur samskipari og ráðgevi.

Ráðharrin vitjar í Føroyum hesa vikuna.

## Altsamt fleiri venda sær til Kreppumiðstøðina

*Hóast eingi hagtøl eru í Føroyum, ið vísa hvussu umfatandi harðskapurin er í móti kvinnum og børnum, so gevur uppgerðin hjá Kreppumiðstøðini eina mynd. Har kann eisini staðfestast, at tølini eru ikki minkandi*

Dagfinn Olsen

Hyggja vit at tølunum, so var árið í fjør (1999) árið við hægstu tølunum. 540 vendu sær til Kreppumiðstøðina og 21 kvinnur og 28 børn gistu.

Í januar 1989 varð Kvinnuhúsfelagið set á stovn og 1. oktober í 1990 lat Kreppumiðstøðin upp. Ráðgevingin byrjaði í 1991 og í dag eru 6 fólk knýtt at hesi. Í 1991 varð fyrsta lønta starvsfólk sett í starv. Í dag eru 1,3 størv í húsinum og umframt eru 35 sjálvboðin. Fíggjarliga grundarlagið undir Kvinnuhúsinum/Kreppumiðstøðini er stuðul frá tí almenna og øðrum.

Fólk úr nærum øllum kommunum í landinum venda sær til Kreppumiðstøðina, fyri at fáa hjálp og ráðgeving.

**Frá 1.10.1990 til 30.04.2000:**

| | Henvendelser | | Beboerdøgn | | Beboere |
|---|---|---|---|---|---|
| | kv. | børn | kv. | børn | |
| 1990 | 5 | 5 | 2 | 3 | 1 |
| 1991 | 104 | 114 | 17 | 12 | 5 |
| 1992 | 372 | 290 | 68 | 18 | 12 |
| 1993 | 261 | 242 | 182 | 13 | 16 |
| 1994 | 316 | 234 | 148 | 12 | 7 |
| 1995 | 518 | 396 | 612 | 18 | 24 |
| 1996 | 434 | 435 | 288 | 17 | 14 |
| 1997 | 387 | 445 | 960 | 12 | 11 |
| 1998 | 383 | 423 | 407 | 14 | 13 |
| 1999 | 540 | 711 | 915 | 21 | 28 |
| 2000 | 174 | 116 | 77 | 6 | 2 |
| Ialt | 3164 | 3023 | 3401 | 133 | 124 |



# Fiskikapping verður í Havn leygardagin

*Nú verður aftur kappast um silvurtoskin, sum verður handaður í Vágsbotni leygarkvøldið*

Fyri árum síðan var fiskikapping eitt av árligu afturvendandi tiltøkunum hjá Lions Club Tórshavn. Steðgur hevur verið í nú í fleiri ár. Men komandi leygardag verður roynt aftur. Hesaferð í samstarvi við Bátafelagið í høvuðsstaðnum. Ágóðin av fiskikappingini fer allur til Bátafelagið, sum hevur brúk fyri peningi til tess at bøta um umstøðurnar í felagshúsunum í Vágsbotni.

Kappingin er sett at byrjað kl. 8 á morgni og skal vera endað kl. 17. Uppboðssøla av fiskinum byrjar beint sum kappingartíðin er endað.

Silvurtoskurin verður handaður vinnaranum kl. 18. Tá fáa eisini nr. 2 og nr. 3 steyp til ognar.

Allir luttakararnir fáa flógvar pannukøkur og ein heitan munn, tá ið teir leggja at landi.

**Kappingarreglur**
1. Kappingartíðin er at rokna frá kl. 8.00 til kl. 17.00.
2. Áðrenn farið verður, leggur hvør bátur at í Vágsbotni. Har verður luttakaraprógv fingið í hølum Bátafelagsins.
3. Loyvdur reiðskapur er snøri, snella og tráða.
4. Fiskurin verður blóðgaður og kruvdur, men ikki avhøvdaður.
5. Afturkomin verður luttakaraprógvið býtt um við annað prógv, ið sýnir, nær ið báturin er afturkomin. Tikið verður ímóti veiðuni frá kl. 14.00.
6. Veiðan verður teggjað í hóskiligar teggjur og uppskipað við hølini hjá Bátafelagnum í Vágsbotni.
7. Allur ágóðin av hesari kapping verður latin Bátafelagnum.
8. Tann bátur, sum fær mestu vekt upp á mannin, fær *Silvurtoskin* í varðveitslu í eitt ár. Manningin á hesum báti fær steyp til ognar. Somuleiðis fær manningin á nr. 2 og nr. 3 steyp til ognar. Manningarnar á vinnarabátunum verða bidnar um at møta í Vágsbotni kl. 18.00, har ið silvurtoskur og steyp verða handað.

**Viðmerking**
Kongafiskur, seiður og ónyttufiskur verður ikki roknaður uppí.

Um onkur bátur, ið hevur fingið luttakaraprógv, av eini ella aðrari orsøk ikki fær tikið lut í kappingini, so verður lagt viðkomandi eina við at boða frá hesum, so ikki óneyðugur ótti kemur at standast av hesum.

**Annað á skránni**
Í sambandi við fiskikappingina skipar Lions Club fyri øðrum longu kl. 10 fyrrapartin. Umframt at høvi verður hjá fólki at keypa sær ein drekkamunn og okkurt afturvið, verður møguligt at keypa sær góðan ræstan fisk.

Hja børnunum verður møguligt at royna seg á hestbaki og hoppiborg verður eisini í Vágsbotni henda dagin.



## Dramaverkstaðið vísir leikir

*Barnasjónleikarafelagið Dramaverkstaðið fer á pall við tí, ið arbeitt hevur verið við í februar. við eru eini 60 børn og ung*

Eini 60 børn og ung millum 9 og 19 ár fara aftur í ár á pall at vísa fyri foreldrum og avvarðandi tað, ið tey hava arbeitt við á Dramaverkstaðnum. Byrjað varð 17. mai. Møguliga verða fleiri sýningar og smærri fæst at vita um hetta við at ringja 31 60 28.

Skúlin hjá Barnasjónleikarafelagnum Dramaverkstaðnum leggur orku í at gevaluttakarunuum innlit í og frálæri í leiklist. Samstarv er við Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla. Øll, ið hava hug fyri drama og sjónleiki, eru vælkomin at melda seg til.

Talan er um 5 bólkar, ið einaferð um vikuna hava vant 4 leikir av útlendskum uppruna, men sum eru leysliga umsettir ella nýttir sum íblástur av Hjørdis Johansen. Hon er lærari og leikstjóri á skúlanum. Pallhjálparfólk eru Ragna Maja Kruse og Christian kruse. Hann ansar eisini ljósunum og ljóðinum.

Tónleikarar hjá bólki 2 eru Oddvør Johansen og Kanny Samleben og Edvard Nyholm Debess tók upp. Sanglærari hjá bólki 3 var Malan Thomsen, ið eisini hevur lagt tónleikin á fløgu.

Sýningarnar eru ókeypis, men øll eru vælkomin at lata eit oyra í hattin við dyrnar. - do -


## Søkt verður eftir fólki til Vinnumálastýrið

### 2 projektfulltrúar til ES-verkætlan

**Uppgávur:**
Høvuðsuppgávurnar verða at laga føroyska lóggávu á veterinera og heilsufrøðiliga økinum til ES reglur.

**Krøv:**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv ella líknandi útbúgving.
Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til edv.
Fólk, sum eru um at vera liðug við útbúgving sína, eru vælkomin at søkja.

**Setanartreytir:**
Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingarfelagið.
Setanarskeiðið eru tíðaravmarkað til 31. desember 2000, tó so at talan kann verða um fast starv eftir hetta.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsóknir:**
Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 9. juni 2000.
Størvini verða sett skjótast tilber.

### Skrivari

***Vegna barnsburð verður søkt eftir skrivstovufólki til Vinnumálastýrið.***

**Uppgávur:**
- Journal og postavgreiðsla
- Ymisk møalsavgreiðsla
- Aðrar fyrifallandi skrivstovuuppgávur

**Krøv:**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi førleika.
Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt. Kunnleika til EDV á brúkarastøði og góð samstarvsevni.

**Setanartreytir:**
Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og starvsmannafelagið.

**Umsóknir:**
Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 16. juni 2000.
Starvið verður sett uml. hálvan juli ella fyrst í august og 6 mánaðir fram.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Vinnumálastýrið
Postboks 377
FO-110 Tórshavn

Vilt tú hava meira at vita um størvini, kanst tú ringja til Bjarna Askham Bjarnason, deildarstjóra, tel 35 60 60.

VINNUMÁLASTÝRIÐ